

Suðuroyar Sjúkrahús skal spara næstan eina millión. Nú verður leitað eftir pengunum og ein máti er at fáa læknalønirnar niður

Bjóða **føroyingum** læknar fyri hálva løn

LÆKNALØNIR Ein donsk vikarstova hevur bjóðað sær til at útvega okkum læknar til tey smáu sjúkrahúsini fyri helvtina av lønini, læknarnir fáa í dag

Áki Bertholdsen

Ein donsk vikarstova hevur bjóðað føroyska heilsuverkinum læknar fyri nógv minni løn, enn teir føroysku læknarnir fáa.

Tað staðfstir Karsten Hansen, landsstýrismaður í heilsumálum.

Hann vísir á, at næsta ár skal Suðuroyar Sjúkrahús spara næstan eina millión og kannað verður nú eftir, hvussu tað kann lata seg gera.

Ein máti at spara, ikki bara í Suðuroy, men eisini í Klaksvík, er at fáa læknalønirnar niður.

Sum støðan er nú, fáa læknar av Landssjúkrahúsinum, sum fara til Suðuroyar Sjúkrahús og á Klaksvíkar Sjúkrahús at arbeiða, eina vikuløn upp á 70.000-80.000 krónur og tað er fallið mongum fyri bróstið.

Kosta bara helvtina

Sjálvir siga læknarnir, at lønin er so høg, tí tá ið teir eru á teimum smáu sjúkrahúsunum, eru teir á vakt 24 tímar um samdøgurið í eina heila viku.

Men nú sigur Karsten Hansen, at í royndunum at finna sparingar á Suðuroyar Sjúkrahúsi, verður kannað eftir um tað ikki ber til at fáa útreiðslurnar til læknalønirnar niður.

- Í hesum sambandi hevur ein donsk vikarstova bjóðað sær til at útvega okkum læknar, sum kosta helvtina av tí í løn, sum teir føroysku læknarnir fáa, sigur hann.

Hann sigur, at nú fer Heilsumálaráðið at kanna um tað ber til at seta hesa skipanin við at fáa læknar frá donsku vikarstovuni, í verk fyri Suðuroyar Sjúkrahús og fyri Klaksvíkar Sjúkrahús.

Forkromað skipan

Hann staðfestir, at samfelagið hevur ikki ráð til at at hava forkromaðar skipanir, sum vit nú hava við læknunum á sjúkrahúsunum í Klaksvík og í Suðuroy.

Eydnast tað, fara sparingarnar á Suðuroyar Sjúkrahúsi ikki at fáa avleiðingar fyri sjúklingarnar.

Men í øllum førum staðfestir hann, at hann fer at tryggja, at virksemið á Suðuroyar Sjúkrahúsi fer at halda fram so trygt og væl, sum gjørligt.

Aksel V. Johannesen helt, at hetta er at spara í óðum verkum.

- Fyrst verður sparingin sett í verk, so verður leitað eftir loysnunum, sigur hann og leggur afturat, at mannagongdin átti at verið tann øvugta.

Karsten Hansen sigur, at hann fer eisini at kanna um útreiðslurnar til heilsuverkið í Suðuroy kann verða bíligari.

Karsten Hansen sigur, at tað verður neyðugt at fáa meiri fyri pengarnar og læknalønirnar eru ein týðandi partur av tí og tað ber ikki til at skipa alt samfelagið eftir einstaklingum.

- Hinvegin havi eg avgjørt fatan av, at allir partar eru sinnaðir til at vera við í tí verkætlanini, leggur landsstýrismaðurin afturat.

» Samfelagið hevur ikki ráð til at at hava forkromaðar skipanir, sum vit nú hava við læknunum á sjúkrahúsunum í Klaksvík og í Suðuroy

Djúpt **óetiskt** at fáa 80.000,- í vikuløn

- MÁ STEÐGAST Hetta kann ikki halda fram, sigur Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum og sjálvur lækni

Áki Bertholdsen

Tað er "djúpt óetiskt", at ein lækni skal fáa 80.000 krónur um vikuna í løn.

Tað heldur Jenis av Rana, formaður Miðfloksins, og sjálvur lækni.

Hann sipar til lønina læknar av Landssjúkrahúsinum fáa fyri at arbeiða á teimum báðum smáu sjúkrahúsunum.

- Hetta er ein skipan, sum ikki kann halda fram, leggur hann afturat.

Suðuroyar Sjúkrahús skal spara eina millión og nú er floksfelagi hansara, Karsten Hansen, landsstýrismaður í heilsumálum, farin at leta eftir pengunum.

- Spara vit 20.000 um vikuna í læknalønum á Suðuroyar Sjúkrahúsi, gevur tað meiri enn eina millión í sparing um árið, sigur formaður Miðfloksins.

Jenis av Rana vísir eisini á, at einasti urologur í Føroyum er á Suðuroyar Sjúkrahúsi, men kortini brúkar heilsuverkið nógvar pengar upp á útlendskar urologar.

- Tað mesta av hesum útreiðslunum kunnu sparast burtur á Landssjúkrahúsinum og á Klaksvíkar Sjúkrahúsið og flytast á Suðuroyar Sjúkrahús, sigur hann.

Jenis av Rana sigur, at her eru gyltir møguleiki at spara pengar í heilsuverkinum.

- Fáa vit minka lønina úr hjá teimum læknunum úr 80.000 krónur um mánaðin, niður í 40.000 krónur um vikuna, er tað framvegis talan um eina vitleysa vikuløn.

- Men tað er ein sparing á yvir tvær milliónir hjá Heilsiverkinum og eg ivist stórliga í um læknarnir fara at siga nei takk til eina vikuløn á 40.000 krónur, staðfestir Jenis av Rana.

Hann sigur, at hetta er eitt dømi um, at tað er nóg mikið av pengum í skipanini og so leingi tað er støðan, má tað bera til at spara, uttan at siga fólki upp, sigur formaður Miðfloksins.

- Eg havi ikki ringa samvitsku yvirhøvur at spara í einum Heilsuverki, har slíkt fer fram, leggur hann afturat.

Karsten Hansen sigur, at tað verður neyðugt at fáa meiri fyri pengarnar og læknalønirnar eru ein týðandi partur av tí og tað ber ikki til at skipa alt samfelagið eftir einstaklingum.

- Hinvegin havi eg als ikki fatan av, at allir partar ikki eru sinnaðir til at vera við í tí verkætlanini, leggur landsstýrismaðurin afturat.

Stjórin **bíðar**

Ronnie Midjord, stjóri á Suðuoyar Sjúkrahúsi, sigur, at enn eru ongi stig tikin at seta sparingina á eina slaka millión í verk á Suðuroyar Sjúkrahúsi, soleiðis sum Løgtingið hevur samtykt.

Hann sigur, at Heilsumálaráðið ætlar at brúka fyrsta ársfjórðing at fáa greiði á læknaligu viðurskiftunum og læknalønunum, sum nevnt er í hinum báðum greinunum.

Fyrrenn boð eru komin aftur úr Heilsumálaráðnum, verður onki gjørt, sigur hann.